

# Danskt farmaskip skrivar søgu í Arktis

**Jan Müller**

24.09.2013 - 08:56

Oljan.fo

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur tað eydnast einum farmaskipi at sigla úr Kyrrahavinum til Atlantshavið gjøgnum útnyrðings farleiðina norðan fyri Alaska og Kanada. Skipið er danska Nordic Orion hjá reiðaríinum Nordic Bulk Carriers.

Skipið hevur siglt í seks dagar og er komið ígjøgnum tann mest avbjóðandi parting av siglingarleiðini, tað fyrsta síðani oljutangaskipið Manhattan í 1969 sigldi á hesi siglingarleiðini sum tað fyrsta nakrantíð.

Talan er bæði um eina søguliga hending men eisini um eina nýggja tíð fyri farmaflutning. Nýggja siglingarleiðin styttur munandi um teinin úr Kyrrahavinum til Atlantshavið. Í dag verður farið gjøgnum Panamaveitina og tað tekur nógv longri tíð.

Danska skipið er lastað við 75.000 tonsum av koli úr Vancouver í Kanada til Finlands. Skipið sparirr 1850 kilometrar sigling og nógvar pengar.

Alt hevur gingið eftir ætlan og er skipið á leiðini vestan fyri Grønland við kós móti Finlandi sigur stjórin í Nordic Bulk Carriers, Christian Bonfils, við Jyllands-Posten.

Orsøkin til at siglingin er møgulig er heitara veðurlagið. Spuringurin er so bara, hvussu leingi tað ber til at sigla í hesum farvatninum uttan, at ísurin skapar trupulleikar. Eisini er spurningurin, nær Kanada heldur tað vera rætt at gera íløgur í størri trygd.



